Christian Høgni átti sigursmálið

Landsliðsvenjarin var eygnavitni til, at Christian Høgni Jacobsen átti stóran leiklut í Vejle útisigrinum á Brønshøj

1. DEILD DANMARK
Jóannes Hansen



Christian Høgni Jacobsen legði upp til málið hjá Vejle í dystinum ímóti Brønshøj, og varð róstur av Vejle-venjaranum fyri avrikið á einum heldur óvanligum vongverja-plássi.
Mynd: Savnsmynd

Christian Høgni Jacobsen er væl fyri. Tað vísti hann í Tingbjerg í Keypmannahavn leygardagin, og tað nýtist eingin at siga føroyska landsliðsvenjaranum. Henrik Larsen var millum teir bara 357 áskoðararnar, sum í oysandi regninum fylgdu heimaliðnum Brønshøj.

Vejle vann 1–0. Teir fingu málið í fyrsta álopinum eftir steðgin. Christian Høgni Jacobsen skoraði ikki málið. Tað varð Jerry Brown skrásettur fyri. Men málskjúttin undirstrikaði staðiliga, at tað var Christian Høgni Jacobsen, sum átti forarbeiðið, og at tað var talan um stórt einmansavrik hjá føroyska landsliðsspælaranum.

Á heimasíðuni hjá Vejle Boldklub fær avrikið og uppleggið til einasta málið, sum Christian Høgni Jacobsen stóð fyri, skribentin at minnast aftur á ein av bestu spælarunum hjá Vejle nakrantíð. Hann heldur, at tað mest av øllum líktist tí, sum John Sivebæk plagdi at útinna.

Christian Høgni var millum teir fyrstu ellivu, og hann var vongverji í høgru síðu. Í venjingardystunum hevur annars verið lagt upp til, at Christian Høgni skuldi verða annar av fremstu monnunum. Men mikudagin varð vongverjin í høgru, Christian Keller, seldur til superligu felagið Viborg FF. So vóru góð ráð dýr hjá venjaranum, Frank Petersen. Hann valdi at flyta Christian Høgna aftur á høgra vongverjan, sum hann røkti í fleiri av dystunum hjá NSÍ fyrr í summar, og so varð pláss fyri Jerry Brown í álopinum.

Í fyrsta álopinum eftir steðgin streyk Christian Høgni Jacobsen av egnari hálvu og til baklinjuna, og so smekkaði hann flatt innfyri og í brotsteigin.

– Christian Høgni átti alt hatta málið, sum tað var. Mín uppgáva var bara at seta innaru síðuna á. Tað var sera einfalt og lætt, undirstrikaði málskjúttin.

Venjarin hjá Vejle, Frank Petersen, var heilt væl nøgdur við avrikið hjá føroyska spælaranum:

Han udfyldte rollen som højre kant på fortringlig vis, segði venjarin um Christian Høgna. Umframt føroyska spælaran hevði venjarin hug at nevna Vejle málverjan, Stig Olsen, sum eisini er málverji á U–20 landsliðnum. Hann hevði fleiri sera góðar bjargingar, tá heimaliðið síðsta korterið av 1. hálvleiki og fittar løtur av seinna umfarinum hevði hug at trýsta. Men teir fingu einki mál, og harvið kom Vejle betri frá fyrsta umfarinum, enn teir eru komnir síðstu sjey árini.

FCK er nú millum oddaliðini

Todi hevði tveir góðar møguleikar, men tað var avloysarin hjá honum, sum syrgdi fyri at sigurin kom til høldar

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tvey umfør eru spæld av donsku superliguni, og longu nú er tað soleiðis, at einki lið hevur fult stigatal. Enn eru tað fleiri, sum ikki hava tapt, og FCK er millum teirra, sum hava vunnið eina ferð og spælt ein javnleik.

Hesa ferð var føroyska liðið í Keypmannahavn í útjaðaranum av høvuðsstaðnum. Í Køge hava teir ongantíð áður spælt í tíggju ára gomlu superliguni, og tað eru seytjan ár síðani, at teir vóru í fremstu rað, sum tá kallaðist 1. división.

Eingin ivi var um, at favorittarnir úr FCK høvdu betri spælarar, og at teir høvdu størri breidd. Men tað gekk striltið, sera striltið at fáa málini, sum skulu til, um ein fótbóltsdystur skal vinnast.

Í síðsta minuttinum undan steðginum fekk FCK brotsspark, sum Thomas Røll Larsen setti í málið. 1–0 er eingin leiðsla at hvíla á, og eitt korter undan dystarenda fingu teir í FCK ein orduligan skelk, sum næstu løtuna sá út til at skula kosta teimum sigurin. Eftir flatt innlegg úr høgru og snilda detalju av Tommy Olsen, sum leingi hevur verið fremsti álopsmaðurin hjá Køge, kom bólturin í ein av verjuspælarunum hjá FCK, snýtti málverjan og fór í málið, og harvið var 1–1, og sensatiónin lúrdi.

Kortini eydnaðist tað FCK í evstu løtu at fáa tvey mál og harvið at fáa øll stigini við aftur til miðbýin. Peter Møller, sum eitt korter undan leikloki hevði avloyst Toda Jónsson, stútaði fyrra málið. Hann varð spældur leysur av Carsten Fredgaard, sum eisini var innskiftur. Hann hevði loyst Peter Nielsen av.

Zuma staðfesti 3–1 sigurin í síðstu sekundunum. Sambært donsku fjølmiðlunum var Zuma ikki serliga væl upplagdur hesa ferð. Hann tóktist troyttur og at treingja til hvíld meiri enn nakað annað. At hann støðugt hevur vant og spælt dystir við FCK og suðurafrikanska landsliðnum í næstan tvey ár, verður hildið at hava sett síni spor.

Todi Jónsson var eftir smáskaðarnar aftur millum teir fyrstu ellivu. Tað var dynamikkur yvir spælinum hjá honum, hann tiltuskaði sær tveir góðar møguleikar, men krúnan á verkinum hjá einum álopsspælara – málini – restaðu. Eina ferð sneiddi Todi seg leysan av verjuni, og tá málverjin kom út ímóti royndi hann at lyfta upp um hann, men bólturin fór eisini omanfyri málið. Eina ferð drønstútaði hann úr trettan metrum, eftir at Zuma hevði lagt innfyri úr høgru, men málverjin bjargaði.

Málríkt umfar

23 mál vórðu skorað í teimum seks dystunum. Tað vil siga, at miðaltalið var næstan fýra, og tað má metast at vera nógv, tá havt verður í huga, at eingin dystur endaði við stórsigri.

Størsti skelkurin var leygardagin í Brøndby, har heimaliðið undir leiðslu av Michael Laudrup rættuliga kom niður á jørðina. AB vitjaði og fór avstað aftur við full uppibornum 3–1 sigri, eftir at teir eftir fyrra umfarið høvdu verið frammanfyri 3–0. Michael Laudrup ásannaði, at tað hansara menn høvdu víst í 1. hálvleiki var undir allan kritikk.

Kanska var tað europeiska luttøkan, sum órógvaði. Hvussu tað verður við tí stríðnum fæst at síggja í morgin, tá Brøndby skal spæla í albanska høvuðsstaðnum Tirana.

Eins góðir og Brøndby

Í Árhus hevur fótbóltslagið ikki verið nakað serligt í fleiri ár. Stóra felagið í býnum, AGF, hevur støðugt stríðst fyri at varðveita sessin í bestu deildini. Undan summarsteðginum megnaðu teir tað akkurát, men nú eru aðrir tónar at hoyra, og tað sæst á vøllinum, at nýggi venjarin, Poul Hansen, hevur fingið skil á.

Eftir 2–2 á heimavølli frammanfyri tíggju túsund áskoðarum hildu spælararnir, at teir hava eitt eins gott lið og Brøndby. Tað er ein ikki sørt næsadjørv útsøgn, tá gongdin síðsta kappingarár verður havd í huga.

Men moralurin var góður í Árhus sunnudagin. Esbjerg kom á odda 1–0, og í síðsta álopinum undan hvíldini øktu teir. Í fjør hevði henda gongdin heilt víst skotið AGF í senk. Soleiðis var ikki hesa ferð. AGF reisti seg og prógvaði harvið, at liðið hevur fingið ein spælistíl, og at teir hava sinniliga yvirskotið, sum skal til. Esbjerg málverjin kiksaði heilt illa beint eftir steðgin, tá innlegg kom úr høgru, sum hann ikki megnaði at halda. Nýggi maðurin í AGF álopinum, Morten Poulsen, skoraði, og hann stóð eisini fyri útjavnandi málinum.

OB var á odda 2–1, tá tað var hálvleikt. Men Silkeborg javnaði og fekk harvið fyrsta stigið í hesum kappingarárinum.

Í Farum var lagið heilt gott. Eftir 2–2, tá tað var hálvleikt, megnaðu teir at vinna 3–2 á Viborg, og harvið var fyrsti sigurin í superliguni nakrantíð komin til høldar. AaB, sum í fyrsta umfarinum vann í Esbjerg, var aftur á útivøll. Talan var um grannastrið í Ikast ímóti FCM, sum vann 2–0.

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluviðir 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluviðir, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

TIL SØLU
4 vetrardekk, Firestone, 175/65 R14, lítið og einki brúkt. Seljast við felgum fyri 3.000 kr.
Tlf. 314876 / 214876

TOYOTA COROLLA
Toyota Corolla frá juli '96. Í sera góðum standi. Hevur bert koyrt 69.000 km. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 314876 / 214876

TOYOTA COROLLA
Toyota Corolla 1,3 frá '86. Biliga til sølu sum eykalutir.
Tlf. 314465 / 253443

MOTORUR
Toyota Hiace motorur, 2400ccm, til sølu fyri 4.800 kr. Eg havi eisini aðrar eykalutir. T.d. felgur, rútar og nógv annað. Ring og spyr.
Tlf. 423572 / 210560

FELGUR TIL SØLU
14" sportfelgur við heilársdekkum til sølu fyri 4.000 kr. Nýprísur: 6.500 kr. (sum nýtt).
Tlf. 252326

NISSAN CHERRY
Ein Nissan Cherry 1,5 aut.gear frá '86. Bilurin hevur nummarplátur og kann koyra. Kann eisini brúkast sum eykalutir.
Tlf. 313790 / 220405

TIL SØLU
Mazda Bj 2500 Picup dupult cabin ikki 4x4, koyrt 28000 km, árg. 11/05/2000, til sølu fyri 80.000 kr.
Tlf. 224496/457860

PEUGEOT 306
Peugeot 306 1,9 Diesel frá mai '95.
Tlf. 443208 / 210755

TOYOTA CAMRY
Toyota Camry frá '89 til sølu. Oljutangi til sølu.
Tlf. 216363

OPEL ASTRA 1,6 STW
Árg. mai 98, km. 64.000, sýnaður mai 2002, vælhildin. Kr. 115.000.
Tlf. 319440

VW GOLF
VW Golf GTI frá nov. '85 til sølu.
Tlf. 311477

JEEPUR TIL SØLU
Svartur Suzuki Vitara vøruvognur frá '91 til sølu. Hevur el-rútar og powerstýring. Nýsýnaður.
Tlf. 211641

EYKALUTIR
Eykalutir til Ford Sierra Plaza frá '89 til sølu. Manglar tær ein eykalut so ring!
Tlf. 213695

NISSAN MICRA
Nissan Micra 1,0 frá okt. '98 til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er vælhildin.
Tlf. 222550 ella um kvøldið 322573

DAIHATSU CHARADE
Daihatsu Charade frá '88 til sølu. Anlegg v/ hátalarum fylgir við. Prísur: 12.000-15.000 kr.
Tlf. 226621 / 317714

BMW M3
BMW M3, 200 hk. Nýsýnaður. Hevur stereoanlegg, sportfelgur, leðurkabinu og sóltak.
Tlf. 218255 / 266000

FORD SIERRA
Ford Sierra CLX 2,0i frá '91, biliga til sølu.
Tlf. 221487

TOYOTA CAMRY
Nýsýnaður Toyota Camry SV21. Bilurin er nýlakeraður, hevur sportfelgur og sóltak og sær gott út.
Tlf. 218255

NISSAN PATROL
Nissan Patrol 3,3 turbo. Stutta modellið, við setrum aftan.
Tlf. 218255 / 266000

NISSAN BLUEBIRD
árg.89.nýsýnaður við sleipikróki biliga til sølu.
Tlf. 332847--257647

EYKALUTIR
Eykalutir til Mercedes 190, árg. '88-'92 til sølu.
Tlf. 217778

FORD SIERRA
Ford Sierra, árg. '89 til sølu fyri 4.000 kr. Sportfelgur fylgja við.
Tlf. 317362 ella 217362

VW GOLF
VW Golf, árg. '87 til sølu fyri 6.000 kr.
Tlf. 316265

FORD SIERRA
Ford Sierra 2,0 - árg. '91 til sølu. Nýsýnaður, ongan kross. Sær gott út og er í góðum standi.
Tlf. 373288 ella 254079

RENAULT MEGANE
Renault Megane Coupe 1.6i frá '96. Hevur koyrt 133.000 km. CD-spælari og pikadekk á felgum fylgja við.
Tlf. 441802

ELLISAKFAR TIL SØLU
Volvo Amazon árg. ´65 til sølu
Tlf. 26 42 69

DAIHATSU CHARADE
Daihatsu Charade G100, árg. '89. Nýsýnaður, í góðum standi til sølu fyri 10.000 kr.
228347 ella 312515

OPEL ASCONA
árg. 87, til sølu sum eykalutir fyri 2.000 kr.
Tlf. 254611 - 421600

Amboð

VIÐFESTISVOGNUR
Brúktur viðfestisvognur til sølu. Mát á last: 370x170x40cm.KAJ ANDREASEN & CO:
Tlf. 315600

SPROYTUKABINA
Sproytukabina, typa Blowtherm, til sølu.
Tlf. (0045) 22438134

ROTORSLÁIMASKINA
Rotorsláimaskina til sølu. Passar til allar traktorar. Slær 1,5 m breidd. Til sølu fyri 5.500 kr.
Tlf. 451047

Arbeiði

REINGERÐ
Søkt verður eftir fólki til reingerð á matvøruvirkinum Krás mánakvøld til fríggjakvøld frá kl. 17–21. Áhugað kunnu venda sær til Jens Ingolf á:
Tlf. 311161, P/F Poul Hansen

BÓKHALDSARBEIÐI
Eg kundi hugsað mær eitt bókhaldsarbeiði eftir vanliga arbeiðstíð, ið er uml. 10 tímar um vikuna. Er áhugi fyri hesum, so vinarliga ring á
tlf. nr. 318811, e. kl. 17.00

BÓNDAGARÐSARBEIÐI
Fólk søkist til ymiskt fyrifallandi bóndagarðsarbeiði.
Tlf. 313963 / 223777

SPROYTING
Tilboð ynskist uppá at sproyta/lakkera eina borðplátu. Skal verða sera væl gjort, háglans.
Ring tlf. 421424 og gev eitt boð

YNSKIST
Eg ynski at fáa tjans, sum avloysari, við linu- ella snellubáti úr Klaksvík.
Tlf. 223282

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjort, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaansing

BARNAANSING
Vit leita eftir kvinnu at ansa 2 ára gomlum drongi gerandisdagar frá 15. august.
Tlf. 314740

BARNAANSING/HÚSHJÁLP
Vit søkja eftir ungari gentu, sum kundi hugsað sær at arbeitt sum húshjálp í Danmark og passa tvey børn í aldrinum 6 og 9 ár. Byrja 1. september.
Tlf. 0045 76968085

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Koyristólur til tvíburðar, av merkinum Graco Duosport, til sølu. Regnslag fylgir við.
Tlf. 315154 / 250530

YNSKIST
Tvillinga combi barnavognur ynskist skjótast gjørligt.
Tlf. 318700 / 243224

EMMA OG NATASHA SELJA
Gráur Brio koyristólur v/ galesju: 600 kr. Pusliborð v/ baðikari: 500 kr. Bilstólur 0-18 kg: 500 kr. Alt í allar besta standi.
Tlf. 319892

BARNAVOGNUR
Myrkabláur Brio barnavognur til sølu fyri bert 1000,- kr. Er í góðum standi og sær gott út. Babylift, kurv, regnskjól og madrassa til vognin og liftina fylgja við.
Tel. 312004

YNSKIST
Ein Hokus Pokus stólur ynskist til keyps. Vinarliga ring
33 24 08 ella 26 00 45

BABYLIFT
Lítið brúkt babylift, myrkablá, til sølu fyri 800 kr. Bara brúkt til eitt barn.
Tlf. 226090 ella 252351

Bátaútgerð

MOTORUR YNSKIST
Hevur nakar ein Sole Diesel motor, 31 HK, 4 cyl. til sølu sum eykalutir, vinarliga ring
tlf. 373004, best eftir kl. 17.

8-MANNAFAR
Frambygt 8-mannafar til sølu. Glasfibur. Bygt í Kaldbak. Hevur VHF og farvu ekkolodd.
Tlf. 251946 / 224209

RASARI TIL SØLU!
Rasari 5x2m, við 40 hk Mariner, til sølu. Prísuppskot: 20.000 kr. ella yvir.
Tlf. 217802 / 317686

TIL SØLU
M/B Støðsteinur til sølur. Hevur fiskiloyvi og er útgjørdur til línu og snellu.
Tlf. 455919 / 221519

SKRÚVUR TIL SØLU
Tríbloðað skrúva 17x11 H (132) til 30mm aksil, 1.000 kr. (nýprísur: 2.500 kr.). Tríbloðað skrúva 12x7 (minni) til 24mm aksil, 800 kr. (nýprísur: 2.000 kr.).
Tlf. 229235

KØLIVATNSPUMPA YNSKIST
Kølivatnspumpa ynskist til keyps. Merki: Sole Mercedes 36-42 HK.
Tlf. 456422

TIL SØLU
Um hóskandi boð fæst, verður ein 27 fót „Myra" glastreyja bátur seldur. Báturin við hevur ein MD40 Volvo Penta 6 Syl. 95 hk., er væl útgjørdur við: 4 automatiskum El snellum, hydraulisum línuspæli, radara, ekkuloddi, kortplottara, sjálvstýrara og gummi bjargingarbáti.
Tlf. 214246

Bingo

VÁGS MATMØÐRAFELAG
Bingo verður í felagshúsinum ónskvøldið 7. aug. kl. 19.30.
Vágs Matmødrafelag

ARGJA RÓÐRARFELAG
Argja Róðrarfelag hevur gott bingo í neystinum á Argjum 8. aug. kl. 19. Full pláta 400 kr., tó 6-12 spæl 500 kr. Á lutaseðli m.a. 2x500 kr., 1x1.000 kr., 1x1.500 kr. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

FRÁ ELDRAFELAGNUM NÓN
Bingo verður í Støkkhøllini týsdagin 6. aug. kl. 19.30.
Eldrafelagið Nón

Bøkur

BØKUR
Vit taka ímóti bókum.
Tlf. 319630, Reyði Krossur Føroyar

Burturm. /funnið

SÓLBRILLUR
Hevur nakar funnið einar sólbrillur í einum brúnum hylki 26. juli 2002. Eru mistar millum Kongabrúnna og Kondittariið. Vinarliga ring:
Tlf. 263284

NOKIA 3330
Er tað nakar, ið hevur funnið eina Nokia 3330? Eg havi mist hana 11. juni í Tórshavn ella á Toftum. Vinarliga ring til mín.
Tlf. 448036, Eir

KETTLINGUR
Kettlingur burturblivin í Kristiansgøtu tann 31. juli. Hann er gráflekkutur. Um nakar hevur sæð hann, vinarliga ring á:
Tlf. 312231

FØROYSK HÚGVA
Hevur nakar funnið eina føroyska húgvu, uml. 6-8 ár, í Kommunuskúlagarðinum yvir til Auto, Ólavsøkudag? Húgvan er gomul, sum sæst á fóðrinum. Vinarliga ring
Tlf. 314381 / 312552 / 318779

FYRIKLÆÐI
Fyriklæði til føroyska búnan, svart / reytt vovið, burturmist á Ólavsøku. Sig mær frá!
Tlf. 319700 / 311460

BURTURMIST
Eg misti fartelefonina á ólavsøkukonsertini. Ein hvít Nokia 3310. Hevur tú funnið hana, so vinarliga ring til mín á tlf 31 46 07 ella 22 81 35.
Bjørk

BROSJA
Brosja við mynd av Havnarkirkju burturmist á ólavsøku tann 27. juli. Um tú hevur funnið hana, vinarligast ring á
Tlf. 314137

STARVSFÓLK Á FLOGVØLLINUM
Er onkur av tykkum komin frá á eitt myndatól av slagnum Olympus SE Zoom 115, sum var gloymt umborð á Atlantsflog ólavsøkukvøld, so ringið.
Tlf. 319386 / 219386

HÁLSKETA FUNNIN
Ein lítil hálsketa er funnin í hølinum hjá Grímu eftir Akvariuframsýningini sunnudagin 28 juli. Eigarin kann ringja
tlf. 313025

ER KETTA TÍN HORVIN?
Grá ketta við gulbrúnum plettum og hvít á bringuni og upp á trýnið, funnin á Ternuryggi.
Ring tlf. 215214

BURTURMIST Á ÓLAVSØKU
Um nakar hevur funnið mítt ljósagráa bundna mannfólkakot við snarlási framman, vinarliga ring til mín. Tað hevði glett meg!
Tlf. 314199 / 219152

SILKITURRIKLÆÐI
Blátt silkiturriklæði burturmist um ólavsøkuna. Nærhendis Dj. í Geilsgøtu - J. Broncksgøtu. Finnarin biðist ringja.
Tlf. 422045

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Íbúð ella stórt kamar ynskist til leigu skjótast gjørligt í Havn ella nærhendis.
Tlf. (+45) 98945356 / e-mail: bhe75@sol.dk, Bogi

YNSKIST
Kvinna síðst í 30-unum søkir hús ella íbúð við min. 3 kømurum til leigu í høvuðsstaðarøkinum.
Tlf. 258589

ÍBÚÐ Í KBH YNSKIST
Íbúð í Keypmannahavn ella nærhendis ynskist til leigu ella framleigu sum skjótast.
Tlf. 318884 / 221638

ÍBÚÐ
Mblerað íbúð í Havn til leigu í umleið 3 mðr. Prísur: 4.000 kr. um mðr. við ljós og hita. 2. mðr. leiga forút krevst.
Tlf. 253455

HÚS Í HOYVÍK
Hús í Hoyvík til leigu sum skjótast. 3 kømur, køkur, stova, bryggers, 2 wc. Tey liggja í barnavinarligum umhvørvi.
Tlf. 221006

ÍBÚÐ YNSKIST
Vit eru tríggjar 20 ára gamlar gentur, ið ynskja íbúð í Havn. Vit gjalda til tíðina, fara sera væl um og hvørki roykja ella drekka. Vinarliga ring
220949

Í SANDOYNNA AT FERÐAST!!
So eru stór og góð hús við øllum hentleikum í Skopun til leigu. Húsini eru eisini vælegnaði til bólkar. Nærri frættist á
Tlf. 361061 / 361334

HÚS TIL LEIGU
Vegna skúlagongd uttanlands, leiga vit hús okkara út í fyribils 1 ár við innbúgvi.
Bill.mrk. 070

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

Til frímerki

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn